# MIÐLAFÓLK TIL TRÚBOÐAN

## Trúboðin – ein livandi og spennandi miðil

Søkt verður eftir miðlafólki til www.trubodin.fo. Talan er um fulltíðarstarv. Arbeiðsstaðurin er í Leguhúsinum í Nesvík.
Trúboðin er málgagnið hjá Kirkjuligu Heimamissiónini, sum m.a. kunnar um fjølbroytta arbeiðið hjá Heimamissiónini, eins og tíðindi frá Fólkakirkjuni og øðrum kirkjum og samkomum. Dentur verður lagdur á uppbyggjandi tilfar, eins og at viðgera týðandi og viðkomandi evni. Trúboðin hevur eitt ljóðstudio umframt alla neyðuga útgerð til bæði at kunna framleiða ljóð- og videosendingar.

**Arbeiðið umfatar m.a.**

- at menna fjølbroytt innihald á Trúboðanum
- at síggja møguleikar fyri at fáa sjálvboðin at gerast størri partur av tænastuni á Trúboðanum
- at vera ein kristin rødd í samfelagskjakinum

**Persónligir eginleikar**

- tú dugir væl at skriva føroyskt
- tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og í toymi
- tú tekur undir við tí, sum Heimamissiónin stendur fyri (sí *samleikaskjalið*)

**Vit bjóða tær**

- eitt spennandi og fjølbroytt starv, har tú kanst hava ávirkan
- at vera partur av einum góðum arbeiðsumhvørvi
- løn og setanartreytir eftir nærri avtalu

**Ábyrgd**

- tú vísir til aðalskrivaran

**Umsóknir**

Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum verða at senda til:

Kirkjuliga Heimamissiónin
Att.: Andrias Magnussen, aðalskrivari
Nesvík 8
FO-437 Nesvík
*ella*
andrias@mission.fo

Umsóknarfreistin er 3. mars 2023.

Starvið verður sett, tá rætti persónurin er funnin.

**Meira at vita?**

Set teg í samband við Andrias Magnussen á 230070 ella andrias@mission.fo

---

Kirkjuligu Heimamissiónini er ein sjálvstøðug vekingarrørsla í Fólkakirkjuni. Virksemið fevnir um heimamissión, sjómansmissión og altjóðamissión. Arbeiðið byggir á Bíbliuna og fólkakirkjunnar 5 evangelisk-luthersku játtanarrit. Endamálið er at vekja upp trúarlívið og menna felagsskap teirra trúgvandi. Okkara visjón er at møta menniskjum, har tey eru.

Kirkjuliga Heimamissiónin
Tel. 470000
www.mission.fo